# Hava ikki ráð at lata vera



*Kristian Davidsen heldur, at Føroyar hava ikki ráð at lata vera við eini slíkari íløgu. Undangongumaður hansara í sessinum, Andras Róin, tykist ikki vera ósamdur*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Kristian Davidsen, stjóri í Føroya Tele, heldur, at tað ikki er ein spurningurin um Føroya Tele hevur ráð at gera eina slíka íløgu, men heldur ein spurningur um tey hava ráð at lata vera. – Kaðalin er ein fortreyt fyri menning og vøkstri, heldur hann**

VINNA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Stjórin á Føroya Tele, Kristian Davidsen, var ein fegin maður eftir at teir tríggir sáttmálarnir við útlendsku veitararnar vóru undirskrivaðir í Klingruni á Føroya Tele mánadagin, um at leggja nýggja fjarskiftiskaðalin, SHEFA-2 millum Føroyar og Skotland.

– Eitt nútímans samfelag krevur góðar og skjótar samskiftismøguleikar til útheimin, tí er tað týdningarmikið fyri Føroya Tele at kunna veita tænastur við høgari dygd. Kundarnir krevja breiðband við høgari ferð og óavmarkaði nýtslu, og krøvini til framtíðartænastur fara eisini at hava við sær tørv á hægri samskiftisorku, vísti Kristian Davidsen millum annað á.

– Kaðalin er ein fortreyt fyri menning og vøkstri, heldur hann og sigur, at tað er ikki ein spurningur um at hava ráð, men heldur ein spurningur, um tey hava ráð at lata vera.

### CANTAT-3 tænt fyri seg

Stjórin í Føroya Tele ásannar, at CANTAT-3 kaðalin, sum vit fingu í 1994, ikki er meiri enn næstbesta loysnin fyri Føroyar og føroyingar longur.

– CANTAT-3 hevur tænt væl tey 13 árini, vit hava havt hann. Men støðugt og álítandi breiðband er neyðugt, segði Kristian Davidsen og vísti til kaðalslitið á CANTAT-3 í løtuni, sum hevur víst vaksandi váðan, við ikki at hava eitt gott og trygt sjókaðalsamband aftrat FARICE kaðalsambandinum.

Á tíðindafundinum spurdi umboð fyri sjónvarpið, um livitíðin á einum fjarskiftiskaðali er 13 ár, síðani CANTAT-3 nú verður skiftur út. Svarið var játtandi og sagt varð, at livitíðin liggur millum 13 og 15 ár.

### Røttir samstarvsfelagar

Við á fundinum vóru umboð fyri allar tríggjar samstarvsfelagarnar í verkætlanini. Norddeutsche Seekabelwerke úr Týsklandi, IT International Telecom úr Kanada og Xtera Communications úr Texas. Harnæst var eisini hetlendski løgmaðurin við á fundinum umvegis eitt web-sjónvarp.

Kristian Davidsen segði seg vera sannførandan um, at Føroya Tele hevur valt sær røttu samstarvsfelagarnar. Hann legði dent á, at tað var hansara vón, at teir tríggir partarnir og Føroya Tele fóru at virka sum eitt lið, heldur enn ymsar eindir.

Hetlendski løgmaðurin segði, at hann vildi ynskt at verið við á fundinum í á Føroya Tele, men at veðrið í Hetlandi forðaði honum í hesum.

Hann fegnaðist um sáttmálan, sum var undirskrivaður og segði seg síggja fram til, at kaðalin fór at verða tikin í nýtslu.

### Kaðal betri enn samferðslusamband

Eitt umboð fyri Xtera Communications fekk seinastu orðini á fundinum. Hann segði vóna, at hann ikki kom aftur til Føroya í samband við SHEFA-2 kaðalin. Tí komu teir ikki aftur, so var teirra arbeitt væl úr hondum greitt, segði hann.

Skemtandi endaði hann við at siga, at hann undir øllum umstøðum kundi veita vissu fyri, at fjarskiftiskaðalin fer at veita føroyingum betri samband við útheimin, enn samferðslan landanna millum í dag.

## Avgerandi týdning fyri Føroyar

**Tað heldur Bjarni Djurholm um SHEFA-2 kaðalin, sum skal leggjast úr Føroyum til Skotlands í oktober. – Kaðalin setir Føroyar á heimskortið sum eitt knútapunkt í Norðurhøvum, sigur Bjarni Djurholm**

VINNA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í Vinnumálum, sigur, at nýggi SHEFA-2 kaðalin hevur heilt avgerandi týdning fyri Føroyar.

– Kaðalin setir Føroyar á heimskortið sum eitt knútapunkt í Norðurhøvum, sigur landsstýrismaðurin, sum eisini heldur at tað er ein neyðug íløga hjá Føroya Tele.

– Tað er neyðugt hjá Føroya Tele, og teir hava boðað okkum frá (Vinnumáláráðnum, blðm.), at teir ynskja breiðband til hvørt hús í Føroyum í 2012. Tá verður brúk fyri slíkum kapasiteti sum hesum, sigur Bjarni Djurholm.

Hann vísir samstundis á, at henda íløgan, sum er største einstaka íløgan hjá fyritøkuni nakrantíð, møguliga bert er ein minni partur av øðrum íløgum, sum Føroya Tele er farið undir, soleiðis at Føroyar verða javnbjóðis við tey mest framkomnu londini í heiminum um nøkur ár. Við hesum sendir landsstýrismaðurin nakrar beinleiðis tankar til Visjón 2015, og Bjarni Djurholm sigur, at kaðalin er ein fortreyt fyri hesum.

## KYKMYNDIR:

**Sí annars kykmyndir á www.portal.fo , har samrøður eru við Kristian Davidsen, stjóra í FT, Bjarna Djurholm, landsstýrismann í Vinnumálum og ein av útlendsku veitarunum, Astutosh Bhargava frá NSW.**